

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 01 - 2013

# Danmark nýggjan arktiskan ambassadør

Erik Vilstrup Lorenzen, fyrrverandi danskur sendiharri í Kanada, hevur nú tikið við starvinum sum arktiskur ambassadørur hjá Danmark og harvið eisini Ríkisfelagsskapinum. Hann avloysir Claus Holm, sum varð fyrsti danski ambassadørurin fyri Arktis. Kanada fer í næstum at taka yvir formansskapin í Arktiska Ráðnum, so talan verður um ein nýggjan arktiskan sendiharra, sum hevur fingurin á pulsinum skrivar grønlendska útvarpið á síni heimasíðu. Júst Kanada hevur í longri tíð havt stóran áhuga fyri gongdini í Arktis. Claus Holm, sum tekur við starvi sum sendiharri hjá OECD hevði ikki serstakar førleikar ella vitan um Arktis, tá hann tók við starvinum, men nú hevur danska stjórnin so tryggjað sær ein kapasitet til at taka sær av áhugamálunum hjá Ríkisfelagsskapinum í Arktis. Erik Vilstrup Lorenzen, sum er 51 ára gamal, hevur údbúgving sum cand. scient. pol og hevur arbeitt í uttanríkisráðnum síðani 1991. Vit fegnast um, at nýggi arktiski sendiharrin við síni bakgrund sum sendiharri í Kanada, hevur eina stóra vitan um Arktis. Vit hava havt ein góðan dialog við Claus Holm og síggja fram til tað sama við Erik Vilstrup Lorentzen, sigur aðalskrivarin hjá WWF, heimsnátturugrunninumm, Gitte Seeberg.